**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Varaskúlastjórastarv í Hoyvíkar skúla

Starvið sum varaskúlastjóri í Hoyvíkar skúla verður lýst til setanar frá **1. august 2003.**

Skúlaárið 2003/2004 verða 434 næmingar í 7 árgangum í skúlanum.
29 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Hoyvíkar skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 32.1 og 32.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal vera Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 14. mai 2003.**

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

Tórshavn, 29. apríl 2003
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 - Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055
e-postur: mmr@mmr.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir pedagogum til vøggustovuna og barnagarðin, at byrja 1. august 2003 ella eftir avtalu. Arbeiðstíðirnar eru 30 og 40 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er ein sjálvsognarstovnur við eini 5 manna nevnd, har trý eru politiskt vald og tvey eru foreldravald umboð

**Umhvørvið rundanum Dagstovnin á Argjum**
- Beint við er hagin við alskyns møguleikum
- Sandá rennur framvið, og Sandagerð er tætt við
- Bussleið 2 steðgar við stovnin

**Stovnurin leggur dent á at bjóða**
- Ein pedagogik, har dentur verður lagdur á menning og avbjóðing
- Virðing og trivna, bæði hjá børnum og vaksnum
- At stovnurin er opin og jaligur um framtíðina og broytingar
- Forskúla og gott samstarv við skúlan
- Serøki deyv tunghoyrd

**Hví trívast starvsfólkið á stovninum**
- Tí at vit fáa fakliga mennandi avbjóðingar
- Tí at vit sjálvi eru við til at seta dám á stovnin
- Tí at vit hava 12 børn í bólkinum og kunna yvirskoða arbeiðsuppgávuna
- Tí at arbeitt verður við trivna, dygd og menning

**Hvat kunnu vit bjóða tær**
- Eitt starv har tú kanst hava ávirkan
- Eitt starv har tú kanst nýta tínar dygdir og samstundis menna teg sjálva(n)
- Eitt starv har vit lýta á teg, so tú kanst arbeiða sjálvsstøðugt
- Eitt starv har dentur verður lagdur á opinleika

**Afturfyri krevja vit av tær**
- At tú hevur námsfrøðiliga útbúgving
- At tú hevur fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- At tú trívist við at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert framfýsin

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara, á telefon 219019, ella at ringja 319019 lokal 10.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 7. juni 2003.

# Kvikkeyp í Hornabø

Vit søkja eftir fólki til kvøld- og vikuskiftisvaktir. Helst yvir 18 ár.

**S/P Kvikkeyp**
Háskúlavegur 2
Tlf. 322006

# M/B Dúgvuberg til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er trolbáturin Dúgvuberg, Klaksvík, til sølu.

Eisini kann tilboð gevast uppá felagið sjálvt.

Áhugað kunnu senda skrivlig tilboð til:

**Sp/f Dúgvuberg**
Boks 125
700 Klaksvík

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Minnisgrunnur Sonnu av Skarði

Stuðul til teirra, ið søkja sær útbúgving í handarbeiði.

Á hundrað ára føðingardegi Sonnu av Skarði tann 19. apríl 1976 stovnaði Tórshavnar kommuna "Minnisgrunn Sonnu av Skarði".

Endamál grunsins er at menna og lívga føroyskt handarbeiði, føroyska handarbeiðsmentan og veita fólki, sum fáa sær handarbeiðsútbúgving í tóvirki (tekstil) fíggjarligan stuðul.

Tygum fáa meiri at vita um minnisgrunnin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og framtíðarætlanir í tóvirkisútbúgving skal sendast Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, merk "Minnisgrunnur Sonnu av Skarði".

Freistin er sett til 2. juni 2003.

SNARSKIVAN

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

**Er ætlan at keypa ella leiga:**
- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.
- Facadustillads
- Trygdargirðing
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar



HÜNNEBECK

Leverandørurin til føroysk byggivirkir í 28 ár

Sosialurin 311820